FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 23.05.16**

**Á fundi:** Erika Anne Hayfield, adjunktur (forkvinna)
Turid Christophersen, lesandi (næstforkvinna)
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen (útbúgvingarleiðari)
Ingi Jacobsen, lesandi (ikki møttur)
Annika Soll, lesandi
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Feedback frá seinasta fundi:**

EH kannar við Bókasavnið, um Ba-ritgerðir undir punkt 4. ymiskt.
EH kannar um til ber at fáa allar frágreiðingarnar frá samstarvsnevndarfundum frá Elin Heinesen.

Umrøtt var, at tað er óheppið at skeið á Setrinum hava eru so ymiskar til støddar, hvat ECTS viðvíkur. Sambært Bologna avtaluna er eisini umráðandi, at skeiðini ikki eru ov lítil til støddar. Hetta viðførir yvireksaminering. Harumframt var hildið, at tað er óheppið, at bert møtiskylda er á skeiðum á onkrum deildum FMD, t.v.s. eingin próvtøka fyri at standa.

2. **Kunning til lestrarráðið um eftirmeting:**
   - **Fund**
   - **Spurnarblað Moodle**
   - **Spurnarblað á Firstclass**

Lestrarráðið er kunnað um tilgongd til eftirmeting.

3 **Ba í Búskaparfrøði:**

Útbúgvingarleiðarin hevði eina framløgu um nýggju útbúgvingina í Búskaparfrøði. Ætlandi er at taka 25 lesandi inn hvørt ár. Lestrarráðið er sera jalig mótvegis nýggju útbúgvingini, sum verður mett at geva góðar fakligar møguleikar fyri lesandi. Tó er støddin á skeiðum eitt stórur trupulleiki fyri hini Bachelor lesandi tí hvørt skeið telur 7,5 ECTS ímeðan restin av SSD brúkar 10 ECTS. Kjakast var sera leingi um hetta mál og lestrarráðið var samt um, at útbúgvingin ikki kann góðkennast orsakað av støddina av skeiðunum.

Útbúgvingarleiðarin boðaði frá, at námsskipanin og skeiðslýsingarnar ikki eru klárar enn. Ynski hjá lesandi var eisini, at uppgávurnar eru á Føroyskum til próvtøkuna í Búskaparfrøði. Niðurstøðan var, at forkvinnan orðar skriv til varadekanin við grundgevingum fyri, hví útbúgvingin ikki kann góðkennast í verandi líki.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**4 Góðskrivingar:**

Kemur fyri á næsta Lestrarráðsfundi 20. juni.

**5 Skeiðslýsingar (BL):**

Skeiðslýsingin 2438.15 Starvslæra BL, ynski var um, at fáa starvslæru og ECTS afturfyri. Tímatal og lærumál, praktikkpláss, góðkennast av útbúgvingarleiðara. BL tillagar skeiðslýsing og sendir aftur til Lestrarráðið til kunningar.